# Føroysk violin vitjar við góðum harkakaliði



Angelika fór blaðung at leika violin. Eftir lokan fólkaskúla leitaði hon sær til Íslands at lesa tónleik og hon hevur nú í trý ár lisið tónleik í Reykjavík og vónar hon at gera sig lidna við útbúgvingina komandi ár

**18 ára gamla Angelika Nielsen er úr Vestmanna lesur tónleik í Íslandi. Um ein líltan mánað kemur hon til Føroya at leika, sum partur av altjóða bólkinum Network North Traditioanal Music. Unga vestmannagentan fór ung at læra seg violin og helt ung fram á somu leið á tónleikaskúla í Reykjavík. Hon leikar við Føroya Symfoniorkestri og er eisini kend innan spælimanstónleikin og nú verður høvi at hoyra hana saman við tónleikasnillingum uttan úr heimi**

TÓNLEIKUR
*Dagfinn Olsen*
*Myndir: Jan Muller*

Spælimenninir, sum onkuntíð eisini høvdi heitið ”í Hoydølum”, eru kendir millum manna í Føropyum. Spælimenninir hava givið út útgávur, spælt víða um heim og spælt nógv í Føroyum.

Seinnu árini hevur ein ungur violinleikari gjørt vartvið seg sum partur av bólkinum. Angelika Nielsen úr Vestmanna er 18 ár. Mamman er violinlærari og Angelika fór blaðung at leika violin. Eftir lokan fólkaskúla leitaði hon sær til Íslands at lesa tónleik og hon hevur nú í trý ár lisið tónleik í Reykjavík og vónar hon at gera sig lidna við útbúgvingina komandi ár.

Fleiri kenna eisini Angeliku sum part av Føroya Symfoniorkestri. Hóast ung, so hevur hon drúgvar royndir inna klassiskan- og fólkatónleik og hon telist millum teir av okkara tónleikarum, ið hava leikað nógv úti í heimi.

Í fjør var hon í Aberdeen við Kára Sverrisson til Fiddle Convention, hon hevur leikt í Stavanger og verið í Finnlandi sum instruktørur.

Eina mest hoyra vit um, tá popp- og rockbólkar, ella einstaklingar innan hesar tónleikagreinar, gera vart við seg uttan fyri landoddarnar, men Angelika Nielsen er ein av okkara ungu tónleikarum, ið hevur ferðast nógv í norðara parti av Europa og sum hevur leikt nógv í Føroyum. Longu sum 13 ára gomul gjørdist hon partur av Spælimonnunum.

## Network North Traditional Music

Og um lítlan mánað kemur Angelika til Føroya at leika. Og hesaferð er Angelika partur av bólkinum Network North Traditional Music, ið er settur saman av tónleikarum úr átta londum: Danmark, Noreg, Svøríki, Finnlandi, Onglandi, Írlandi, Wales og Angelika umboðar Føroyar.

Føroya Fólkatónleikarafelag er limur í Norðurlendsku Nevndini fyri fólkatónleik og dans. Nordisk Kulturfond hevur fíggjað verkætlanina Network North Traditional Music og sum limur í Norðurlendsku Nevndini er Føroyar eisini boðið við.

Bólkurin ella verkætlanin Network North Traditional Music er á ferð og vitjar øll londini, ið limirnir koma úr. Bólkurin hevur leikt í Oxford og tann 21. oktober verður bolkurin at hoyra í Norðurlandahúsinum í Føroyum.

Endamálið við verkætlanini er millum annað at menna samstarvið millum londini, eins og kunnleikan til fólkatónleikin í ymsu londunum. Fólkatónleik-arar skulu samansjóast og áhoyrarar í londunum skulu hava møguleika at hoyra ymsan fólkatónleik. Økjast skal um arbeiðsmøgu-leikarnar hjá yrkisfólkatónleikarum í londunum. Hetta er nakað av tí, sum stendur í endamálsorðingini fyri verkætlanina.

## Bærentsen og Svabo

Írland stendur frammaliga, tá hugsað verður um tónleik. Hvat føroyskur fólkatónleikur hevur at bjóða violinini er heldur avmarkað. Men Ívar Bærentsen hevur gjørt tonleik til violin og eisini er ein gomul nótabók hjá Svabo funnin í Pætursastovu á Reyni í Havn. Úr hesi bók hevur Angelika funnið sær ymiskt at leika. Júst serstakan dám innan fólkatónleik eiga vit ikki í Føroyum, tí langt hevur verið millum ljóðførini í gomlum døgum. Men vit eiga sangir, sálmar og góð løg og júst Svabo sigst vera ein, ið gjørdi nógv við violinspæl.

Í Network North Traditional Music eru rutineraðir og eins og ungir og dugnaligir tónleikarar og mong ymisk ljóðføri. Nakrar violinir eru, ein hardangerfiól, guitari, ein tin whistle, kantele, ið er minnir um harpu, og ein viola d’amour, ið er strúkiljóðføri úr barokktíðini og var nógv frammi fyri eini 300 árum síðani.

Av tí, at manningin í bólkinum er úr ymsum londum, hevur verið trupult at venja, Men bólkurin hevur verið saman í Oxford og nótatilfar er sent millum limirnar og einstakir limir hava eisini vant í smærri eindum.

Nógv ferðing er fyri framman hjá limunum í Network North Traditional Music, hóast ein stuttur steðgur er miðskeiðis á rundferðini til ymsu londini.

Spennandi bólkurin vitjar Norðurlandahúsið í Føroyum tann 21. oktober. Tá fáa spælimannavinir møguleika at hoyra eina altjóða blanding av fólkatónleiki, ið hevur ein skvamp av føroyskum við eisini. Tey leikandi í Network North Traditional Music eru:

DANMARK
Henrik Jansberg
(violin)
Føroyar
Angelika Nielsen
(violin)
NOREG
Synnøve S. Bjørset
(hardanger fiól)
ONGLAND
Chris Wood
(fiól / sang)
FINNLAND
Timo Väänänen
(kantele)
SVØRÌKI
Sophia Eriksson
(viola d'amore)
ONGLAND
Robert Harbron
(concertina / guitar)
ÍRLAND
Gavin Whelan
(whistle / low whistle)
WALES
Dylan Fowler
(guitar)

Meira fæst at vita um Network North Traditional Music við at hyggja á heimasíðuna www.folkogdans.no/networknorth



Bólkurin ella verkætlanin Network North Traditional Music er á ferð og vitjar øll londini, ið limirnir koma úr

Bilar
Nr. 189 • hósdagur • 3. oktober 2002 • 76. árg.

# Hyundai Getz – koreanari í evropeiskum stíli

**Hyundai Getz er eitt ítøkiligt prógv uppá, at koreanarnir av álvara hava fingið fótin fastan í Evropa. Bilurin er gjørdur beinleiðis til kapping á evropeiska marknaðinum**

BILAR
*Magnus Gunnarsson*




*Birgir og Frits Dam Jacobsen frá Norðbil halda seg hava góð kort á hondum, nú teir hava fingið Hyundai Getz bæði hvat viðvíkur sjálvum bilinum og prísunum*

Meira enn 300 motorjournalistar úr meginpartinum av heiminum vóru herfyri samlaðir í Kolding, har Hyundai Getz alment varð sýndur fram. Tað var ikki av tilvild, at koreanarnir í hesum føri, valdu eitt evropeiskt land, tí endamálið er heilt greitt at kappast á evropeiska marknaðinum. Ein triðingur av øllum seldum persónbilum í Evropa eru bilar hesum klassanum. Hyundai Getz fær góðar karakterir í ymiskum testum, har hann verður samanlíknaður við aðrar evropeiskar og japanskar bilar. Koyrieginleikarnir eru á hædd við teir evropeisku kappingarneytarnar. Navnið Getz er ein stytting av "get it", við øðrum orðum at bilurin er verdur at ogna sær.

## Smartur og praktiskur

Hyundai Getz fæst við trimum ymiskum bensinmotorum. Tann minsti er 1,1 litur við 62 hk, síðan ein 1,3 litur við 82 hk og tann største er 1,6 litur við 105 hk.

Styrkin hjá Hyundai Getz er innrættingin. Designið innan er smart og praktiskt, og alt er í evropeiskum stíli. Bilurin er góður at sita í og rúmligur bæði framman og aftan. Beinplássið framman og aftan er líka gott sum í nógvum størri bilum. Viðvíkjandi plássinum á baksetrinum setur bilurin heilt nýggjan standard í hesum klassanum. Um man hevur brúk fyri størri viðførisrúmi er tað lættasta sak av verðini at leggja ryggin á baksetrinum niður uttan at taka nakkastútturnar úr. Dúrkið verður tá heilt slætt.

Sum standard er Getz útgjørdur við fýra el-síðurútum, el-síðuspeglum við hita, sentrallási, radio við bandavspælara og 6 hátalarum og forsetrið kann stillast allar vegir. Í bíligastu útgávuni kostar Hyundai Getz 1,1 litur GL við 3 hurðum kr.112.750 og tann dýrasti, ið er ein 1,6 litur GL við 5 hurðum, kostar kr.134.750.



*Design í evropeiskum stíli innan*

## Hyundai Getz 1,3 GL 5/h

| | |
|---|---|
| Motorurin | 1,3 litur 4 syl. 82 hk |
| 0-100 km/t | 11,5 sek. |
| Bensinnýtsla | 16,1 km/l (blandað koyring) |
| Dekkstødd | 175/65-14 |
| Stødd og vekt: | |
| Longd | 381,0 cm |
| Breidd | 166,5 cm |
| Hædd | 149,0 cm |
| Eginvekt | 1000 kg |
| Totalvekt | 1500 kg |
| Viðførisrúm | 312 / 977 |
| Prísur | kr. 125.750 |
| Søluumboð | Sp/f Norðbil<br>Oyggjarvegur<br>FO-100 Tórshavn<br>Tlf. 313707 |




*Hyundai Getz fæst bæði við 3 og 5 hurðum.*